# SEV lækkar el-prísin til vinnulívið

**Við avgerðini at lækka el-prísin rættir SEV føroysku vinnuni eina hjálpandi ein hond, nú líkt er til at ein ávís niðurgongd er at hóma í føroyska búskapinum. Tað privata húsarhaldið skal gjalda sama prís sum tey hava gjørt seinastu fimm árini**



*SEV boðaði fríggjadagin frá, at el-prísirnir til ídnaðin fara at lække komandi árið*
*(Mynd: Jens Kristian Vang)*

VINNULÍV

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hóast spádómar um verri tíðir í føroyskum búskapi, so fer hetta ikki at ávirka el-prísirnar hjá SEV. Teir verða nevniliga teir somu tað komandi árið. Fyri ídnaðin verður talan enntá um eina lækking.

Henda avgerðin hjá SEV kemur uttan iva væl við, bæði hjá tí vanliga fólkinum, men eisini hjá virkisleiðarum og teimum fyritøkum, sum nýta nógvan streym í tí dagliga.

Leiðslan í SEV kunnaði fyrrapartin fríggjadagin tíðindatænastuna um hesa avgerðina, áðrenn farið varð á ein størri fund fyri umboðslimunum í hesum stóra felagsskapinum.

Hesin umboðsfundurin var ein heldur søguligur fundur, har eisini onnur enn bara umboðsnevndin høvdu møguleika at lata rødd sína hoyrast í orðaskiftinum. Men sum skilst vóru tað kortini fá sum gjørdu brúk av hesum møguleikanum.

## Ein sosial skipan

Hvat hava el-prísirnir hjá SEV og føroyska grindadrápið við hvørt annað at gera?

Ein løgin spurningur, kanska. Men í báðum førum er talan um eina sera sosiala skipan, sum er til gagns fyri brúkaran. Í grindadrápi so, at øll fáa eins stóran part, og fyri el-prísirnar hjá SEV, at brúkarin í Sumba og Mykinesi skal gjalda sama prís sum ein brúkari í Havn.

Og nú hevur SEV enntá lagt upp til, at prísirnir verða óbroyttir tað komandi árið, hóast tekin eru til eina ávísa niðurgongd í búskapinum.

– Hóast útlitini eru døpur, so hava vit avgjørt at tillaga fíggjarætlanina fyri 2005 soleiðis, at prísirnir fyri ta privatu nýtsluna ikki hækka, men standa í stað, varð upplýst á tíðindafundinum.

Prísirnir til teir privatu kundarnar lækkaður seinastu ferð 1. januar í 2000, og eru tað nú fimta árið á rað at hesir prísir standa í stað.

## Stórar oljugoymslur

Verða prísirnir óbroyttir fyri húskini, so er tað serliga ídnaðurin sum fer at fáa fyrimunir frá SEV. Elprísurin til ídnaðin fer nevniliga at lækka úr 67 oyrum fyri hvønn kilowatttíma niður í 64 oyru frá ársskiftinum.

Tað eru tvær orsøkir til hesa avgerðina hjá SEV. Í fyrstu syftu talan um, at goymslurnar av olju eru rímiliga stórar, og verða tær tí ikki ávirkaðar av skiftandi oljuprísum, eins og hjá fiskiflotanum. Hinvegin so verður tann størsti parturin av teirri termisku framleiðsluni framleiddur úr tungolju.

Í upprunaliga uppskotinum til fíggjarætlan fyri komandi ár varð ikki roknað við einum vøkstri í søluni. Men við teimum útlitum, ein nú kann síggja í framtíðini, verður ístaðin roknað við eini lækking í nýtsluni uppá 2 % í 2005.

## Nýtslan minkar

Tað eru trý viðurskifti sum sermerkja útreiðslurnar hjá SEV – olja, lønir og tilfar. Higartil í ár hevur oljan verið tann størsti parturin av útreiðslunum.

Á inntøkusíðuni eru somuleiðis trý viðurskifti, ið gera seg galdandi – broytingar í el-prísunum, broytingar í el-nýtsluni og forskjótingar millum teir ymisku kundabólkarnar.

SEV kann í dag staðfesta, at inntøkan hevur verið vaksandi orsakað av vaksandi nýtslu. Fyrra hálvár í ár helt hesin vøkstur fram, men síðani í juli mánaði hevur verið eitt fall í nýtsluni, um ein metir saman við somu mánaðir í fjør. Um henda gongdin heldur fram henda seinasta mánaðin av árinum, verður nýtslan tann sama í ár sum í fjør.

Samstundis verður mett, at heldur henda gongdin á, verður sølan minni komandi ár, kanska eini 2%, metir SEV.

Hóast øll hesi viðurskifti so fer SEV altso at hava sama prís á streyminum komandi ár til tey privatu húsarhaldini, meðan elprísurin til ídnaðin lækkar.

STARVSLÝSING

## Kunningarfólk

**Fyri kunningarfólk okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja beinanvegin á starvsfólkadeildini.**

**Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.**

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við stjóran, deildarleiðaran og onnur skrivstovufólk á starvsfólkadeildini, at røkja ymiskar uppgávur viðvíkjandi samskifti, innan- og uttanhýsis kunning, heimasíðuviðlíkahaldi og samskipan av ávísum uppgávum. Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Góður kunnleiki til tær edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda
Landsverki
Postsmoga 78
110 Tórshavn
og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 6. desember 2004.
Merkið brævbjálvan "Kunningarfólk".

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara, á tlf. 311 333 (e-postur: lh@lv.fo).

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*